## UTTAN ÚR HEIMI

## Aftur ja til ES

Annan mánaðin á rað vísir ein meiningakanning hjá norska blaðnum Aftenposten, at 58 prosent eru fyri norskum limaskapi í ES og 42 prosent ímóti.

Kanningin hjá blaðnum kemur bert fáar dagar eftir eina kanning í Dagbladet, sum vísti, at 49 prosent høvdu sagt ja og 36 prosent nei, var fólkaatkvøða um norskan ES-limaskap nú.

Kanningin hjá Aftenposten vísir samstundis, at 20 prosent av teimum, sum atkvøddu ímóti limaskapi á fólkaatkvøðuni í 1994, høvdu atkvøtt fyri nú. Fimm prosent av teimum, sum søgdu ja í 1994, høvdu sagt nei, fingu tey sama spurning nú. Kanningin hjá Dagbladet vísti eisini, at nógv av teimum, sum søgdu nei fyri átta árum síðani, hava broytt hugsan.

## Settur í húsavarðhald

Myndugleikarnir í miðamerikanska landinum Nicaragua góvu gjáranáttina herinum boð um at standa tilbúgvin, eftir at tjóðartingið hevði gjørt av at taka parlamentariska immunitetin frá fyrrverandi forsetanum Arnoldo Aleman. Stutt eftir avgerðina varð gamli forsetin tikin og settur í húsavarðhald.

Ákæruvaldið í Nicaragua vil vera við, at Arnoldo Aleman gjørdi sær dælt av landsins pengum ta tíðina, hann var forseti frá 1977 til í fjør. Sagt verður, at sambært ognaruppgerðini átti hann 360.000 krónur í 1989, men at ognin brádliga var vaksin til 1,8 milliard krónur í fjør. Ákæruvaldið ivast ikki í, at teir nógvu pengarnar hevur hann fingið sær úr tí almenna kassanum.

Tann 57 ára gamli Aleman hevur fyrr sagt, at tað fer at elva til blóðugar samanbrestir, verður hann tikin. Tí gav stjórnin herinum boð um at standa tilbúgvin til tess at forða fyri ófriði.

## Nú mala allar myllurnar

Nú mala allar tær 80 vindmyllurnar í heimsins størstu vindmyllulund á sjónum, sum er uttan fyri Horns Rev vestan fyri Esbjerg.

Tær 80 vindmyllurnar skulu roynast eina ferð afturat, áðrenn tær endaliga verða handaðar orkufelagnum Elsam. Verkætlanin er seinkað umleið eitt hálvt ár orsakað av ymsum tekniskum trupulleikin.

Tær 80 vindmyllurnar eru settar upp í átta røðum við tíggju myllum í hvørjari røð. Tær standa á einum øki, sum er næstan 20 ferkilometrar. Tann myllan, sum stendur næst landi, er einar átta fjórðingar úr Blåvands Huk beint norðan fyri Esbjerg. Elsam væntar, at tann veruliga orkuframleiðslan frá teirri nýggju vindmyllulundini verður sett í verk tíðliga næsta ár.

## Táragass ímóti mótmælisfólki

Í venesuela halda túsundtals fólk fram við mótmælunum ímóti Hugo Chavez, forseta, sum tey vilja hava frá.

Hóskvøldið legði løgreglan uppí fyri at spjaða ta stóru mannamúgvuna. Løgreglan nýtti táragass, men ein talsmaður hjá amerikanska eindarfelagsskapinum OAS sigur, at tiltøkini hjá myndugleikunum fara ikki at gera enda á mótmælunum ímóti forsetanum. Mótmælisfólkini krevja, at forsetin skal skriva út fólkaatkvøðu í seinasta lagi í mars næsta ár, so fólkið kann taka støðu til, um tað vil hava forsetan at halda fram í embætinum ella ikki.

Tey áhaldandi mótmælini hava kostað venesuelanska ríkiskassanum nógvar pengar, tí oljuútflutingurin hevur ligið at kalla lamin seinastu tíðina. Landið er fimtistørsta oljuútflytaralandið í heiminum, og fyrradagin elvdi kreppan í Venezuela til, at oljuprísurin á marknaðinum í New York hækkaði.

# Turkar noyðast at bíða

**Í fyrsta lagi um tvey ár kunnu turkar fáa at vita, um landið er búgvið til limaskap í ES**

ES-TOPPFUNDUR
*Árni Joensen*

Sum væntað eydnaðist tað ikki turkum at fáa ES at áseta ein dag fyri, nær samráðingar um turkiskan limaskap í samveldinum kunnu byrja.

Anders Fogh Rasmussen, ES-formaður hevur alla tíðina sagt, at Turkalandi er ikki búgvið til at koma upp í ES, og hann og hinir ríkis- og stjórnarleiðararnir hava nú givið turkum tvey ár til at fyrireika seg til møguligar samráðingar. Í desember í 2004 fer ES so at taka støðu til, um viðurskiftini í Turkalandi eru so mikið broytt, at landið lýkur treytirnar fyri limaskapi.

Enn er langt á mál. Eitt nú er ES als ikki nøgt við mannarættindini og tær demokratisku skipanirnar í Turkalandi, og búskapurin lýkur heldur ikki treytirnar. Millum annað er inflasjónin heili 30 prosent.

Seinnapartin í gjár bendi annars alt á, at samráðingarnar um at taka tey tíggju umsøkjaralondini upp í ES vóru um at koma upp á pláss. Tá restaði bert tað seinasta viðvíkjandi Pólandi, sum framvegis strongdi á fyri at fáa meiri pengar til bøndurnar.

# Gøla um rasismu í USA

**Bush forseti noyddist at seta ein av sínum týdningarmestu politisku feløgum upp á pláss, men spurningurin er, um tað er nóg mikið**

RASISMA Í USA
*Árni Joensen*



*Trent Lott og George W. Bush hava nógv at tosa um í hesum døgum, nú tann fyrri hevur tikið undir við gomlum rasistiskum sjónarmiðum*

*Mynd: Reuters*

- Tað hevði verið betri fyri USA, hevði Thurmond vunnið forsetavalið í 1948, segði tann komandi republikanski formaðurin í senatinum, Trent Lott, tá hann herfyri var í 100 ára føðingardegi hjá floksfelaganum Strom Thurmond.

Orðini hjá Trent Lott høvdu eina meining. Í 1948 stillaði Strom Thurmond upp til forsetavalið ímóti Harry S. Truman, men tapti. Thurmond var valevni á einum rasistiskum lista í statinum South Carolina, har rasuskilnaðurin millum hvít og svørt varð hildin í hevd. Sum guvernørur í statinum royndi Thurmond at gerast forseti, men tapti.

Tað hevur vakt stóran ans, at tann komandi republikanski formaðurin í senatinum rósar teimum gomli rasistisku hugsjónunum. Tað vakti eisini ans, at Bush forseti, sum var hjástaddur, tá orðini fullu, einki segði, men síðani hevur forsetin roynt at bøta um hetta við at geva sínum komandi senatsformanni eina nøs. Sjálvur hevur Trent Lott eisini roynt at taka orðini aftur.

Men tað er ikki vist, at tað er nóg mikið. Fleiri svartir felagsskapir í USA og demokratiskir andstøðupolitikarar hava mælt Lott til at taka seg úr senatsembætinum, og fjølmiðlarnir liggja heldur ikki á latu síðuni. Teir kanna nú, um senatorurin fyrr hevur úttalað seg á rasistiskan hátt, og tær fyrstu avdúkingarnar eru longu komnar.

Hetta kemur Bush forseta og republikanarunum sera illa við, tí flokkurin hevur júst roynt at útvega sær veljarar millum tey svørtu.

# Arafat ongan lut í framtíðini

**Tað verður ikki friður í Miðeystri, fyrr enn palestinar fáa eina aðra leiðslu, sigur amerikanski uttanríkisráðharrin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Tað hevur vakt ans, at amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, nú alment hevur givið til kennar, at USA vil hava palestinar at velja sær eina aðra leiðslu.

Á einum fundi segði Powell, at tað endaliga málið í strembanini eftir varandi friði í Miðeystri má vera, at allir partar góðtaka hvør annan sum grannar.

- Í hesari tilgongdini er tað greitt, at her er eingin lutur til ta núverandi palestinsku leiðsluna, tí við hesari palestinsku leiðsluni verður eingin friður í Miðeystri, segði Colin Powell á fundinum.

Í næstu viku fara USA, Russland, ES og ST aftur at samráðast um ætlanina um at skipa eitt sjálvsstøðugt palestinskt ríki um trý ár.




LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Leiðari til eykalutagoymslu

Søkt verour eftir leioara til eykalutagoymsluna á maskinmiostøoini í Kollafiroi. Eykalutagoymslan í Kollafiroi er høvuosgoymsla av teim eykalutum, io nyttir veroa til entreprenørmaskinur og onnur amboo hjá stovninum, skerv- og asfaltverkini, ferjulegurnar o.a. Eisini hevur goymslan um hendi vegastokk, skeltir, smáamboo o.a.

**Arbeiosuppgávur**
Høvuosuppgávurnar eru at leioa hesa goymsluna og saman vio deildarleioaranum at hava innkeyp og útflyggjan av eykalutum o.a. um hendi. Høvuosgoymslan er eisini goymsla fyri hinar smiojurnar, skerv- og asfaltverkini og onnur arbeiospláss hjá stovninum og hevur hon tí neyvt samband vio hesi.

**Førleikakrøv**
Dentur verour lagdur á, at umsøkjarin hevur kunnleika til og royndir vio líknandi arbeioi. At umsøkjarin dugir væl enskt og hevur góoan kunnleika til edv er ein fyritreyt. Kunnleiki til ella royndir vio maskinamboourn er ikki nakao krav, men hevur tó fyrimun. Møguleiki verour eisini fyri at menna seg innan økio vio relevantari upplæring.

**Setanarviourskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrio og avvaroandi yrkisfelag ella sambært avtalu.

**Umsóknir**
Umsóknir vio prógvum og møguligum ummælum veroa at senda Landsverkfrøoinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu veroa skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. januar 2003. Merkio brævbjálvan »Umsókn eftir goymsluleioara«.
Nærri upplysingar um starvio kunnu fáast frá deildarleioaranum á tlf. 422117 lokal 12 ella 219180. E-postur: da@lv.fo





www.sosialurin.fo


Føroya Gjaldstova

## Deildarleiðarastarv

**á Føroya Gjaldstovu innan roknskap og ráogeving er leyst at søkja til setanar beinanvegin.**

Ábyrgdarøkio hjá deildini fevnir um menning av Búskaparskipan landsins, fíggjarstýring, roknskaparviourskifti hjá landinum, leioslu av størri verkætlanum og heimasíouni hjá stovninum.

**Høvuosuppgávur:**
- Búskaparskipan landsins
  – Alment at taka lut í menningini av Búskaparskipan landsins.
  – At tryggja fakliga støoio.
  – At skipa fyri miofirraoari nýtslu av Búskaparskipan landsins.
- Fíggjarstýring
  – Skapa fyritreytir fyri leioslukunning, ætling, stýring og eftirliti.
  – Menna amboo til fíggjarstýring, herundir Leioslukunningarskipanin.
- Roknskaparøkio
  – At evna og seta í verk mannagongdir á økinum.
  – At ráogeva stovnum í roknskaparligum viourskiftum.
  – At skipa fyri undirvísing í partsskipanunum innan Búskaparskipan landsins og í roknskaparligum viourskiftum.
- Verkætlanir
  – Ábyrgd av menningaruppgávum á KT-økinum.
  – Leiosla, um fleiri deildir á gjaldstovuni eru partur í verkætlanini.
- Heimasíoa
  – Menning og viðlíkahald
  – Dagføring av innihaldi t.d. tíoindi, mannagongdir og formálar

**Verkætlanir, sum deildin í løtuni er vio í**
Tao eru serliga tvær verkætlanir, deildin arbeioir vio í løtuni - menning av eini nýggjari budgettskipan og íverkseting av einum Data Warehouse. Budgettskipanin verour longu komandi ár karmurin um fíggjarlógararbeioio hjá landsstýrinum; her verour m.a. hugsao um skráseting, workflow, útskriftir og kunning á alnótini. Verksetingin av einum Data Warehouse skal tryggja lætta atgongd til upplýsingar viov. roknskapi og til fíggjarliga stýring.

**Persónlig krøv:**
Starvio, sum gevur stórt innlit í almenna roknskaparhaldio á tøkniliga, bygnaoarliga og dagliga arbeiosøkinum, krevur, at viokomandi, io settur verour, hevur áræoi, megnar at arbeioa sjálvstøougt, er fyrikomandi, hevur góo samstarvsevnir og hevur lætt vio at samskifta, bæoi munnliga og skrivliga.

**Útbúgving og royndir:**
Tann, io verour settur, skal hava hægri útbúgving og skal hava innlit í arbeiosøkio roknskap og EDV. Best er, um talan er um ein persón, sum hevur útbúgving innan roknskap, hevur arbeitt vio EDV-loysnum á økinum og er vanur vio at arbeioa í verk-ætlanum.

**Setanarviourskifti:**
Starvio er lønt sambært sáttmála millum landsstýrio og viokomandi yrkisfelag. Arbeitt verour á høgum fakligum stigi, og eru góoir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir vio viomælum og prógvum skulu vera Føroya Gjaldstovu í hendi í seinasta lagi 17. desember 2002.
Meira fæst at vita um starvio vio at venda sær til Leif Abrahamsen

*Á gjaldstovuni starvast umleið 30 starvsfólk. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. Gjaldstovan rekur og mennir Búskaparskipan landsins, sum er eitt felagsheiti fyri m.a. roknskaparskipanina Oracle financials, eina felagslønarskipan fyri landið og eina leiðslukunningarskipan. Tað eru einir 150 brúkarar skrásettir í Búskaparskipan landsins.*